

# Statoil byggja gassvirki í Tanzania - Eldborg við í leiting

**Jan Müller**

16.02.2014 - 21:51

Oljan.fo

Statoil og samstarvsfelagið BG skulu byggja eitt gassvirki í havnarbýnum Lindi har suðuri í eysturafrikanska landinum Tanzania. Føroyska veitingarskipið Eldborg er partur av leitingini.

Statoil hevur arbeitt í Tanzania síðani 2007, tá felagið gjørdi ein framleiðslusáttmála við Tanzania Petroleum Cooperation. Statoil er operatørur á økinum við 65 prosentum av loyvinum. Hini 35 prosentini eigur ExxonMobile. Fyri einum ári síðani keypti Statoil 12 prosent av einum øðrum tanzaniskum loyvi, sum Petrobras er operatørur á.

**Funnið nógv gass**

Í 2012 og í fjør fann Statoil gass á tveimum leiðum í Tanzania. Tilsamans er talan um 20 billiónir rúmmetrar ella tvær ferðir meiri enn á Snøhvit-leiðini í Barentshavinum. Útlitini eru eftir øllum at døma góð, tí sambært Bloomberg hevur leitistjórin hjá Statoil, Tim Dodson, sagt, at felagið væntar at finna nógv gass afturat í Tanzania tey bæði næstu árini.

Samstundis er tað greitt, at Statoil skal gera ovurstórar íløgur í Tanzania tey næstu árini. Talan er um íløgur fyri millum 20 og 30 milliardir dollarar, skrivar Blomberg.

Í mai fara myndugleikarnir í Tanzania at bjóða út nýggj leitiloyvi, og roknað verður við, at Statoil fer eisini at liggja framvið tá.

Vert er eisini at býta merki í, at veitingarskipið, sum Statoill brúkar í Tanzania, er Eldborg hjá Skansi Offshore. So eisini her eru føroyingar partur av virkseminum.